# Ein ordans gongutúrur



Nú festivalurin við Múrin av álvara nærkast, og økið byrjar at broyta skap til tónleikamiðdepil má sigast, at Kirkjubøur eftir øllum at døma hóskar væl til endamálið.
Smáar forðingar eru kortini við tiltakinum. Nevnast kann eitt nú tað, at tað ikki er loyvt at hava nakað drekkandi við inná festivaløkið, og hóast hetta kann virka irriterandi fyri festivalgestirnir, so er tað kortini skilligt at hetta ikki letur seg gera, millum annað av trygdaráðum.
Kortini hava fyrireikarar funnið eina góða loysn uppá hendan trupulleikan, og væntandi verður hetta sera væl móttikið av festivalgestunum. Talan er nevniliga um ølsøluna, har ølirnar verða seldar fyri 10 krónur. Hetta er munandi minnið kostnaður enn tað sum vit kenna frá øðrum festivalum, og prísurin má avgjørt sigast verða rímiligur.
Aðrar forðingar kann eitt nú verða teigurin, ið gestirnir skulu ganga áðrenn komið verður til festivaløkið. Vónandi verður ein loysn funnin uppá hetta áðrenn festivalurin av álvara fer av bakkastokki, soleiðis at serstakliga tey, ið skulu tjalda í Kirkjubø, ikki hava fyri neyðini at ganga hendan langa teig fleiri ferð.
Eingin annar nevniverdur trupulleiki tykist hava stungið seg upp enn, men heldur má sigast, at hugnaliga og mentanarríka umhvørvið i Kirkjubø eftir øllum at døma egnar seg serstakliga væl sum festivalbygd. Nú er bert eftir hjá fyrireikarunum at prógva sína dygd, nú teirra fyrsti festivalur við Múrin fer av bakkastokki.

# Rás2 við Múrin

Hóast atgongumerkjasølan sum skilst hevur gingið eftir vild, so eru tað kortini stórur partur av tí føroyska fólkinum, ið ikki fær møguleikan at hoyra Tiesto, Trentemøller, Pipar&Salt og Páll Finnur Páll.
Men kortini kunnu føroyingar kring alt landið verða við í festival feprinum, ið herjar um hesar dagar.
Rás2 sendir nevniliga beinleiðis frá Kirkjubø hósdagin og fríggjadagin, og byrjað verður í dag kl. 15.00.
Tá vitjar kendi danin Trentemøller Eik banka í Havn, og fer hann tá at undirskriva autografar fram til kl. 17.00.
Tiltakið er eisini merkt av livandi tónleiki, tí X-Factor stjørnan Linda Andrews verður at hitta í Eik, har hon eisini fer at framføra nøkur løg av altanini. Møguleiki verður eisini fyri at vinna eitt backstage pass til at hitta Annu David, og verður hesin vinningurin trektur á staðnum áðrenn kl. 17.00.
Rás2 sendir beinleiðis haðani fram til kl. 17.00, tá ið vertirnir í Kirkjubø taka yvir, og senda beinleiðis úr Kirkjubø fram til kl. 23.00 í kvøld. Eisini verður varpað frá festivalinum við Múrin fríggjadagin, og báðir dagarnir verður møguleiki at hoyra samrøður við tónleikarar, fyrireikarar og festivalgestir, og sendingin verður í rætta festivalhýri eisini merkt av tónleiki, bæði føroyskum og útlendskum.
Portalurin og Sosialurin verða eisini í Kirkjubø komandi dagarnir, og til ber at fylgja gongdini í Kirkjubø við myndum, livandi myndum og greinum á portalinum alt vikuskiftið.

# Trentemøller skrivar autografar

Áðrenn Trentemøller fer á pall við Múrin í dag, skrivar hann autografar á ungdómsdeild Eiks, har tiltak verður.
Tiltakið byrjar klokkan 15.00 við vitjan av Trentemøller, sum skrivar autografar. Eisini verður tónleikur á altanini, har eitt nú Linda Andrews fer at syngja.
Eisini luta tey burtur eitt backstage-pass, til at hitta Anna David. Kappingin og burturlutingin verða á staðnum.
Aftaná ber til at ganga niðan í Gundadal, har



# Fólka-heilsu-ráðið við Múrin

Sum verða man verða tað ikki bert básar, ið selja drekkavørum og matvørur við Múrin. Fólkaheilsuráðið hevur ein bás á tónleikafestivalinum í Kirkjubø og fyrireikarar siga, at endamálið er at gera vart við vandarnar av kynssjúkum og narkotika.
Fólkaheilsuráðið sigur, at hagtøl frá Landslæknanum benda á, at trupulleikin við kynssjúkuni, sum er elvd av klamydia er vaksandi. Tað ringa við hesi smittuni er, at tað ber til at vera smittaður við sjúkuni uttan at vita tað. Smitta er rættiliga vanlig, tí av teimum 1299, sum í fjør lótu seg kannað, varð staðfest, at 15 % vóru fongd. Smitta við klamydia kann føra við sær, at fólk ikki kunnu fáa børn. Fólkaheilsuráðið fer tí at geva festivalluttakarunum eitt upplýsandi spurnarblað og hvørt kvøld verða trektir vinningar til teirra, sum svara rætt. Eisini verða hítir býttar út ókeypis.
Til tess at gera vart við vandan við narkotika, hevur ráðið í samstarvi við Apotekaraverkið gjørt ein bókling, har greitt verður frá vandunum, ið standast av rúsevnisnýtslu.

